# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.03.2026 kl. 16.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Poul Laust Christiansen |
| | Rakul Mørk |
| | Jónfinn L. Poulsen |
| | Jóhannes Liasson Rasmussen |
| | Otto West |
| Ikki møtt: | Ronni Hammer |
| | |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **102-17-2026: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 102a og 102b, Hvalba.**

   Søkt verður um, at matr. nr. 102a verður lagt saman við matr. nr. 102b, Hvalba. Hagi og sandlutur skulu býtast frá.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

2. **102-26-2025: Ferðsluviðurskifti – uppskot um 40 km/t sonu.**

   Arbeitt hevur verið við einari ferðsluætlan fyri sóknina fyri at betra um ferðslutrygdina. Gunn Møller, ferðslurevisor hevur gjørt eina ætlan viðvíkjandi skelting í Hvalba, har hámarksferðin verður 40 km/t. Ætlanin er góðkend av avvarðandi myndugleikum.

   **Vega- og havnanevnd 23.03.2026:**

   Nevndin mælir til at góðkenna ætlanina fyri skeltingina, so at kommunan beinanveg kann byrja at skelta við 40 km/t hámarksferð.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

3. **102-22-2026: Eykajáttan 2026 – 1. viðgerð.**

   Søkt verður um eykajáttan fyri løgur 2026.

| | |
|---|---|
| Millumbygningur á dagstovninum | kr. 280.000,00 |
| Vatnveiting | kr. 200.000,00 |
| Fótbóltsvøllur Sandvík | kr. 150.000,00 |
| Bingjuplássið Hvalba | kr. 360.000,00 |
| Eykajáttan íalt | **kr. 990.000,00** |

**Fíggjarnevndin 23.03.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta umsóknini um eykajáttan.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

4. **102-1-2026: Kostnaðarmeting, økið við Dímunarneystið.**
Felagið Lítla Dímun hevur útvegað kostnaðarmeting av at gera økið uttanum Dímunarneystið meiri atkomuligt. Hvalbiar Kommuna eigur økið, ið neystið stendur á og søkir felagið um, at kommunan ger hetta arbeiðið ella verður partur av hesum.
Kostnaðarmetingin fyri uppfylling v.m. og stoyping er kr. 123.990,00 u/MVG.
**Vega- og havnanevndin 23.03.2026:**
Nevndin hevur verið í samráð við felagið Lítlu Dímun og eru komin til ta loysn, at kommunan keypir tilfarið og Lítla Dímun brúkar egið fólk til stoypingina. Nevndin mælir tískil til, at játta kr. 75.000,00 u/MVG, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd í 2026.
**Fíggjarnevndin 26.01.2026:**
Nevndin letur upp til bygdaráðið at taka støðu til málið.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini. Játtanin er treytað av, at almenningurin hevur fullan nýtslurætt á økinum.

5. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.20

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk Otto West

Jóhannes Liasson Rasmussen Jónfinn L. Poulsen